MALANDI HURÐ

Ein malandi hurð hevur trý hurðarbløð, sum mala innan í einum rundum rúmi. Tvørmátið (diameturin) innan í hesum rúmi er 2 metrar (200 cm). Tey trý hurðarbløðini býta rúmið sundur í tríggjar eins partar. Tekningin niðanfyri vísir hurðarbløðini í trimum ymsum støðum, sæð úr erva.



Spurningur 1: MALANDI HURÐ

PM995Q01 – 0 1 9

Hvussu nógv stig er vinkulin ímillum tvey hurðarbløð?

Vinkulstødd: .....°

Spurningur 2: MALANDI HURÐ

PM995Q02 – 0 1 9

Bæði **hurðaropini** (víst við prikkastrikum á tekningini) hava somu stødd. Um hesi op eru ov breið, fáa tey malandi hurðarbløðini ikki latið heilt aftur, og luft kann ótarnað streymað ímillum inngongd og útgongd og hava við sær óynsktan hita- ella kuldamiss. Hetta sæst í tekningini yvirav.

Hvat er tað longsta – í sentimetrum (cm) – tað bogaða hurðaropið kann vera, so at luft ikki gýsir ótarnað millum inngongd og útgongd?



Longd í mesta lagi: ..... cm

Spurningur 3: MALANDI HURÐ

PM995Q03

Hurðin melur 4 heil umfør um minuttin. Tað er pláss fyri í mesta lagi tveimum fólkum í hvørjum av teimum trimum hurðapørtunum.

Hvussu nógv fólk kunna í mesta lagi koma inn í bygningin um hesa hurð í 30 minuttir?

A 60
B 180
C 240
D 720